# Føroyar og Firenze Krimifilmar, Firenze og Stieg Larsson

TÓRSHAVN 1909-2009
Fólkavald kommuna í 100 ár

**Í fyrilesturi í sambandi við 100 ára haldið hjá Tórshavnar kommunu samanbar Jógvan Isaksen Føroyar í dag og Firenze í rennesansuni. Fyrilesturin varð hildin í Havnar Bio fríggjakvøldið 27. februar 2009, tá filmurin «Menn, ið hata kvinnur« varð frumsýndur, sum partur av 100 ára haldinum hjá Tórshavnar kommunu. Hesin filmur byggir á mest læntu bókina á Býarbókasavninum hjá Tórshavnar kommunu, sum 1. apríl hevur virkað í 40 ár**



*Jógvan Isaksen*

Eg skal siga nøkur orð um krimifilm í heila tikið, og so ætli eg mær at gera ein stuttan samanburð millum Føroyar og Firenze í renesansuni. At enda eitt sindur um Stieg Larsson og ta aktuellu søguna.

Mær hevur altíð dámt krimifilmar ómetaliga væl, og nakrir av hesum filmum hava fest seg í huganum. Í veruleikanum eru tað rættiliga nógvir, men eg kann taka tríggjar, sum eg minnist serliga væl, fram.

Tað stendur enn týðiliga fyri mær, tá ið eg sá "The Ipcress File" við Michael Caine á fyrsta sinni. Tað var her í Havnar Bio miðskeiðis í 60'unum, og eg var fullkomiliga burturi í filminum. Fyri meg var tað næstan ein opinbering, hvussu snildisliga søgan var sett saman, og hvussu ótrúliga góður sjónleikari Michael Caine var og er. Tann eingilski høvundurin Len Deighton hevði skrivað skaldsøguna, sum filmurin bygdi á, og eg fór beint út og keypti tær bøkur eftir hendan høvund, sum vóru at fáa hendur á. Síðani man eg hava lisið tað mesta eftir sama Len Deighton og sæð teir flestu filmar við Michael Caine.

Tann næsti krimifilmurin, sum hevði eina næstan líka stóra ávirkan á meg var "Three Days of the Condor", sum eg sá í Århus miðskeiðis í 70'unum. Aftur hesaferð var tað fyri meg ein stórhending, og eg haldi, at eg sá filmin einar tvær tríggjar ferðir innan eina viku. Tað havi eg mangan gjørt við film yvirhøvur – og bøkur eisini – at eg ikki haldi meg hava sæð filmin ordiliga, um eg ikki havi sæð hann í hvussu er tvær reisir og ofta mangar ferðir tað. Tað skal skoytast uppí, at filmurin "Three Days of the Condor" er bygdur á spenningssøgu eftir amerikanaran James Grady.

Eitt heystið í fyrru helvt av 80'unum var eg heima og arbeiddi og legðist við onkrari hálsasjúku, haldi eg. Foreldrini høvdu eina videomaskinu og høvdu tikið ensku sjónvarpsrøðina "Smiley's People" upp. Har lá eg so í songini og sá teir umleið seks tímarnar við Alec Guinness í høvuðsleiklutinum. Bøkurnar hjá John LeCarré eru ikki tær mest hendingaríku, kortini er tann nevnda sjónvarpsrøðin einastandandi spennandi, og eg gloymi hana aldrin.

Men sjálvandi hava nógvir aðrir krimifilmar fest seg í huganum: The Third Man, Chinatown, The Pelican Brief, L.A. Confidential og mangir, mangir aðrir. Hetta bara fyri at gera vart við, hvussu væl mær dámar krimifilm.

Krimifilmur hevur verið til líka so leingi sum filmslistin, men eftir mínum tykki kemur av álvara dik á í 1930'unum og 1940'unum. Týskarar eru frammarlaga í tretivunum við t.d. "Das Testamente des Dr. Mabuse" eftir Fritz Lang í 1933. Sami Fritz Lang var annars hann, sum gjørdi film av Sjúrðarkvæðunum, ella kanska beinari sagt, av sama tilfari: "Die Niebelungen" í 1924. Men tá ið nazistarnir av álvara fingu valdi, máttu menn sum Fritz Lang rýma av landinum, og í mongum føri gekk leiðin til USA, har teir fingu stóra ávirkan í Hollywood.

Tað slagi av filmi, sum nú av álvara ger vart við seg í USA er "film noir", sum var í hæddini frá umleið 1940 til seinast í 1950'unum. Hugtakið "film noir" stavar frá franska ummælaranum Nino Frank, sum setti heitið á hetta slagið av amerikanskum filmi í 1946. Tá ið meginparturin av filmunum blivu gjørdir, var hugtakið sostatt ikki kent. Men hvat fevnir hugtakið "film noir" yvir? Tað er nevniliga eitt hugtag, sum verður brúkt rættiliga fitt eisini nú á døgum.

Íblásturin til hetta slagi av krimifilmi er lutvíst gangstaratíðin í USA frá 1919 til 1933 – tað var tá brennivínsbann var - men blandað við europeiskari ekspressionismu. Sum til dømis Fritz Lang. Filmirnir siga frá eini tíð uttan illusiónir, persónarnir kenna seg vónsviknar, einki er at líta á, einki er at trúgva á. Í samfelagnum er kaos, húsagangur og hóttafall. Um ein bøn bleiv biðin millum fólk í hesum tíðarskeiði, so var hon: "Bara eg ikki verði tikin, uppdagaður og settur í gegli". Tín einasti møguleiki var desperatar gerðir, og samstundis var niðurstøðan, at tilveran er høpisleys. Tað finst eingin ætlan við hesum lívi, og hvussu leikur fer, er næstan fullkomiliga tilvildarligt.

Gitnir film noir-titlar eru t.d. "The Maltese Falcon" 1941 eftir skaldsøgu hjá Dashiell Hammet og við John Houston sum leikstjóra og Humphrey Bogart sum høvuðsleikara. Sam Spade eitur høvuðspersónurin og tann einasti moralur hann kennir til er persónligur, og honum fylgir hann, um hann so skal lata gentuna hjá sær til bøðilin. Humphrey Bogart er aftur høvuðsleikari í "The Big Sleep" 1946, sum er leikstjórnaður av Howard Hawks. Í hesum føri er upprunaskaldsøgan skrivað av Raymond Chandler, sum um høvuðspersónin segði, at hann hevði ikki meira sosiala samvitsku enn ein hestur. Hann hevði eina persónliga samvitsku, og tað var nakað heilt annað.

Í 1950'unum ger tað nýggja rákið (la nouvelle vague) innan filmslist av álvara vart við seg í Frankaríkið, og hvaðani kemur íblásturin? Svarið er frá amerikanskum krimifilmi. Leikstjórar sum Jean-Luc Godard og François Truffaut gjørdu filmir, sum bygdu á amerikanskar gangstarasøgur. Og ein av grundunum til, at tann amerikanski film noir fall í so góða jørð í Europa var nettup, at nógvir af leikstjórunum í Hollywood vóru europearar.

Tað vit síggja her er, at heimsins fremstu leikstjórar gera film eftir skaldsøgur, sum næstan eingi hampafólk vildu vera við, at tey lósu. Meðan krimiskaldsøgur næstan altíð hava verið lítilsmettar og eru tað fyri ein part enn, so hevur krimifilmurin havt eina væl hægri stjørnu. Hví tað er so, veit eg ikki reiðiliga, men kanska hava mentafólk tá á døgum ikki gingið í biograf? Ella er tað hesin forbidni protestantiski moralurin, sum ríður mongum av okkum í Norðurlondum sum ein marra. Er nakað stuttligt ella undirhaldandi, so má tað vera synd og tískil skeivt! Loksins verður enn roynt at uppdraga upp á fólk á hesum øki og fortelja teimum, hvat ið tey skulu dáma og ikki.

Tað gongur bara ikki altíð so væl við hesum. Danski høvundurin Carsten Jensen var í Føroyum fyri jól og segði í samrøðu í útvarpinum, at í einum donskum høpi verða skrivaðar turrar bøkur, sum forløg geva út,